**Formula-deildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 11 | 8 | - | 1 | - | 2 | 21 | 11 | 10 | 25 |
| 2 B36 | 11 | 7 | - | 3 | - | 1 | 20 | 8 | 12 | 24 |
| 3 NSÍ | 11 | 8 | - | 0 | - | 3 | 20 | 10 | 10 | 24 |
| 4 HB | 11 | 6 | - | 2 | - | 3 | 28 | 18 | 10 | 20 |
| 5 GÍ | 11 | 4 | - | 3 | - | 4 | 17 | 22 | -5 | 15 |
| 6 Skála | 11 | 4 | - | 1 | - | 6 | 13 | 20 | -7 | 13 |
| 7 KÍ | 11 | 3 | - | 3 | - | 5 | 21 | 18 | 3 | 12 |
| 8 B71 | 11 | 3 | - | 3 | - | 5 | 19 | 20 | -1 | 12 |
| 9 AB | 11 | 1 | - | 3 | - | 7 | 15 | 25 | -10 | 6 |
| 10 VB/S | 11 | 1 | - | 1 | - | 9 | 9 | 31 | -22 | 4 |

**1. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B68 | 11 | 10 | - | 1 | - | 0 | 34 | 7 | 27 | 31 |
| 2 FSV04 | 11 | 9 | - | 1 | - | 1 | 24 | 9 | 15 | 28 |
| 3 ÍF | 11 | 6 | - | 3 | - | 2 | 28 | 10 | 18 | 21 |
| 4 LÍF | 11 | 6 | - | 1 | - | 4 | 29 | 17 | 12 | 19 |
| 5 TB | 11 | 4 | - | 2 | - | 5 | 15 | 10 | 5 | 14 |
| 6 NSÍ | 11 | 4 | - | 0 | - | 7 | 19 | 24 | -5 | 12 |
| 7 HB | 11 | 3 | - | 2 | - | 6 | 13 | 25 | -12 | 11 |
| 8 KÍ | 11 | 3 | - | 1 | - | 7 | 12 | 27 | -15 | 10 |
| 9 SÍ | 11 | 2 | - | 1 | - | 8 | 11 | 24 | -13 | 7 |
| 10 B36 | 11 | 1 | - | 2 | - | 8 | 8 | 40 | -32 | 5 |



*Liðformenninir hjá B36 og NSÍ, ávikavist Kenneth Jacobsen og Óli Hansen, eru báðir nøgdir stigaúrtøkuna hjá sínum liði, meðan spældi kundi verið betri*

hjá B36 og teir reisast um vikuskiftið, kemur uttan iva at spæla inn, tá liðini hittast fyri seinastu ferð tann 2. september, og helst meiri stendur upp á spæl enn júst nú.

– Tað er nakað tíðliga at siga nú, hvønn týdning dysturin kemur at fáa, men greitt er, at tapa vit, so eru vit fýra stig aftan fyri EB/Streym, meðan ein sigur leggur okkum trý stig framum NSÍ, staðfestir liðformaðurin hjá B36, Kenneth Jacobsen.

## Ynskja hevnd

Liðini bæði hittust 5. apríl við Løkin í Runavík í ár. NSÍ vann 3-0 á B36 og er hetta einasta tapið hjá B36 higartil í ár.

– Vit hava nakað at hevna nú, og við heimavølli hava vit góðar vónir til dystin, sigur Kenneth Jacobsen. Hann letur ongan iva vera um, at B36 ætlar sær inn at vinna dystin.

– Tað er týdningarmiklari hjá okkum at vinna dystin, enn at ikki at tapa hann, sigur ivaleysi Kenneth Jacobsen. Heilt so avgjørdur er Óli Hansen ikki.

–Vónirnar eru hampiligar, men tá tað er sagt, so vita vit eisini, at talan er um ein torføran dyst. Eitt gott úrslit hjá okkum er ein javnleikur ella ein sigur, sjálvandi. Vit fara so at royna at vinna, og beint nú er ein sigur neyðugur fyri at halda stand í oddinum, men eg meti ikki at trý stig eru altavgerandi, heldur Óli Hansen fyri.

## Landsliðsórógv

Fyrireikingarnar til týdningarmikla dystin hava verið eitt sindur órógvaða av landsliðsdystum. Í B36 hava Jákup Mikkelsen, Fróði Benjaminsen, Mikkjal Thomassen og Bergur Midjord verið við landsliðnum, umframt at Jóhan V. Gunnarsson hevur verið við U21.

Hjá runavíkingum er býtið akkurát umvent, tí har hava Einar Hansen, Bogi Løkin og Jóhan Troest Davidsen verið við U21, meðan Hjalgrím Elttør hevur verið við A-landsliðnum.

Havandi hetta í huga er tað eisini áhugavert, at ungu runavíkingarnir ikki hava vunnið eitt einasta FM-heitið í bestu fótbóltsdeildini nakrantíð, meðan roynda B36-liðið hevur átta føroyameistaraheiti á baki. Men meðan siðvenjan hjá B36 vitnar um eitt sigursvant felag, so hava teir ein lutfalsliga óroyndan venjari í Kurt Mørkøre. Tað sama kann ikki sigast um NSÍ, sum í Johan Nielsen hevur royndasta venjaran í landinum við síðulinjuna. Men stigatalvan talar fyri seg, og higartil í ár hava hesir nátt akkurát tað sama. Teir hava fingið 24 stig hvør, og tað eru báðir partar fyri so vítt nøgdir við, meðan spæli kundi verið betri, siga bæði Kenneth Jacobsen og Óli Hansen.

– Vit hava spælt nakrar góðar dystir, og so hava vit eisini spælt nakrar minni góðar dystir, men tað eru góðu løtur okkara í dystunum, sum mugu vara longri, sigur Óli Hansen, og leggur so aftrat:

– Vit hava ikki havt nakað vørumerki, men nú royna vit at skapa eitt.

Hvussu hetta fer at eydnast runavíkingum fæst svar fyri í komandi 16 dystunum. Tann fyrsti av hesum verður sunnudagin í Gundadali, tá runavíkingar vitja har fyri seinastu ferð í ár.

# Við – ikki við

**Skaddur:** Páll Mohr Joensen (lærkrikin)
**Leikbann:** Milan Kuljic

**Skaddur:** Kristian á Lakjuni (fótliðurin), Kaj Ennigarð (knæskaða) og Julian Samuelsen (knæskaða)
**Við aftur:** Heðin á Lakjuni (eygnaskaða), Paul Clapson (lærskaða) og Høgni Madsen (leikbann)

**Ivasamur:** Pól Thorsteinsson (vøddaskaða)

**Ivasamir:** Poul Poulsen, Bogi Gregersen (fótliðurin), Levi Hanssen (fótliður)
**Við aftur:** Predrag Markovic (sjúkur)

**Við aftur:** Dan Djurhuus (sjúkur)
**Hallur Dam Joensen er farin av landinum**

# venda gongdini

| | '06 | 06 | 05 | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36-NSÍ | 2-1 | 1-1 | 2-0 | 0-1 | 1-1 | 2-0 | 1-3 | 1-0 | 5-0 | 3-2 | 2-0 | 3-2 | 8-2-2 | 23-11 |
| GÍ-AB | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |
| Skála-EB/S | 1-1 | - | 1-1 | - | 2-3 | 3-2 | 3-1 | - | - | - | - | - | 2-2-1 | 10-8 |
| B71-HB | - | - | - | - | - | - | - | 3-2 | 0-1 | 2-2 | - | 0-9 | 1-1-2 | 5-14 |
| VB/S-KÍ | 1-7 | - | 5-1 | - | 2-0 | 1-0 | 2-1 | 1-2 | 1-0 | 2-1 | 0-4 | 1-0 | 7-0-3 | 16-16 |